Neistin-VB 24-16 (10-7):

# Silvurið hómast í høvuðsstaðnum

**Neistin setti VB so dyggiliga upp á pláss leygardagin, og nú tosa viðhaldsfólkini so smátt um møguleikan at vinna Stjørnuna aftur**

HONDBÓLTUR – KVINNUR

*Jákup Mørk*

Undan dystinum millum liðini varð sagt, at hesin seinasti dysturin í grundspælinum – tá sæð verður burtur frá útsettu uppgerðini millum Sóljuna og StÍF – var dysturin um triðja plássið.

Stigatalvan talaði eisini sítt sjónliga mál fyri, at so var, men eftir dystin stendur greitt, at í løtuni er eingin sum helst ivi um, hvat av liðunum endar ovarligari á talvuni, tá kappingin er av.

### Brendu alt ov nógv

Frá fyrsta bríksli stóð nevnliga púrasta greitt, at Neistin so greitt var við yvirlutan hendan dagin. Liðið skjýtur kanska ikki so nógv mál, men verjuparturin vigar so væl og virðiliga upp ímóti hesum, og leygardagin viðførdi hesin, at VB bert fekk tvey mál fyrstu 20 minuttirnar.

Tað skal eisini leggjast afturat, at hóast Neistin ikki fekk so øgiliga nógv mál hesa somu løtuna, so var álopsspælið helst hitt mest sannførandi, sum liðið hevur víst higartil í ár. Tær megnaðu í nógv størri mun enn vanligt at seta ferð. Leggja trýst á mótstøðuverjuna, soleiðis at møguleiki var at spæla seg ígjøgnum, og aloftast eydnaðist hetta eisini, men misnýtslan av møguleikunum var alt ov stór til, at tær veruliga kundu draga frá. Vórðu møguleikarnir betri nýttir, er einki at ivast í, at talan kundi gjørst um veruligt sorl, men Timea Vargo í VB-málinum megnaði so at forða fyri hesum.



*Tá Regina Radó í seinna hálvleiki byrjaði at nýta yvirgongdir at koma í skotstøðu, var neistaverjan ofta um ein háls, men hetta var tó ikki nóg mikið hjá VB, sum í løtuni má hyggja langt eftir heiðursmerkjum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Mundi verið spennandi

Ístaðin hevði VB framvegis møguleikan í seinna hálvleiki, og eitt skifti sá eisini út til, at tær ætlaðu sær at gera dælt av hesum.

Neistin byrjaði annars seinna hálvleik betri, og kom eisini seks mál framum, men brádliga fór VB at toga í. Verjuspælið hekk eitt sindur betri saman, og í álopsspælinum tók nú at bragda.

Regina Radó var á veinginum, og fleiri ferðir á rað nýtti hon yvirgongd til at koma í skotstøðu, og slepp-ur hon tað, er mest sum víst, at bólturin verður kleindur upp í málhornini.

Tær á heimaliðnum tóktust alt annað enn álvuligar við støðuna, og spenningurin bara vaks, so hvørt sum VB át seg nærri. Tá Neistin so eisini fekk eina útvísing við støðuni 18-15, sá alt annað enn gott út hjá teimum, men júst um hetta mundi rapaði korthúsið hjá VB.

Regina Radó misnýtti brotskasti, og tá Neistin so beint eftir skoraði, var ikki meira eftir hjá gestunum. Tær megnaðu at svara einaferð, men tað var greitt, at har var ikki meira eftr, og so kundi Neistin staðfesta sigurin við fimm málum á rað.

### Líta at silvurinum

Sum sagt, so bar dysturin boð um, at Neistin í løtuni er eitt nógv betri boð til heiðursmerkini enn VB. Serstakliga boðaði spælið í fyrra hálvleiki frá góðum, og spurningurin tykist í løtuni heldur at vera, um høvuðsstaðarfelagið kann vinna seg fram á Stjørnuna í silvurstríðnum. Ikki minst tí Stjørnan í løtuni er í kreppulíknandi støðu, og millum annað tapti dystin móti VB.

Hjá VB skal hampuliga nógv henda, um tær skulu gera álvara av sínum hóttanum um at taka heiðursmerki.

Sjálvsagt er tað ein smeitur, at Gabriella Fekete enn ikki er 100% eftir skaðan, sum hon fekk móti Kyndli, men hennara styrki er fyrst og fremst í kontraspælinum.

Skal hetta fáast at virka, er neyðugt við sterkari verju, og júst hetta er størsti trupulleikin hjá liðnum í løtuni. Timea Vargo kann ikki einsamøll standa ímóti, tá verjan er sum ein opnahjallur, og fyrst og fremst er tað hetta, sum skal fáast í rættlag, um vónirnar skulu vera til meira enn eitt fjórða pláss.

### Dysturin í tølum

**Neistin-VB 24-16 (10-7)**

Málskjúttar:

Neistin: Gunnleyg Berg 7, Katrin á Neystabø 6(5), Mildrid JAcobsen 5, Birita Wardum 3, Súna Mørk 1, Rakul Augustinussen 1, Annika Thomsen 1

VB: Regina Radó 9(1), Gurið Mortensen 2, Jensia Petersen 2, Sólrun Krosslá 1, Margreth Augustinussen 1, Durita Rouch 1

Brotskøst: Neistin 5, VB 2

Útvísingar: Neistin 3, VB 2

Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum. Komu væl frá eini lættari uppgávu.

Sóljan-VÍF 18-32 (10-12):

# So var posin rúgvaður

**VÍF vann sum størsta sjálvfylgjan í heiminum seinasta dystin í grundspælinum, og hava soleiðis fult stigatal, nú farið verður undir endaspælið**

HONDBÓLTUR – KVINNUR

*Jákup Mørk*

Tað var ikki væntandi, at Sóljan skuldi gera stórvegis við VÍF, og soleiðis gjørdist heldur ikki. Talan var um topp ímóti botni, og hóast botnurin átti heimavøll, so bøtti hetta ikki stórvegis um hjá Sóljuni, sum mest av øllum bara vildi hava hendan dystin aftur um bak.

### Ioana tók yvir

Talan var annars ikki um hin stóra munin í fyrra hálvleiki. Sóljan royndi sum frægast at halda gestunum í stuttum tjóðuri, og hinvegin tóktust vestmannakvinnurnar at hugsa mest um jólafrítíðina, so fyrri hálvleikurin var nú ikki so øgiliga sannførandi.

Í seinna settu meistararnir tó nakað av ferð á. Ioana Rápa, sum ikki hevur eins dominerandi og vanligt í ár – tað hevur ikki verið neyðugt – tók sær nú veruliga um reiggj, soleiðis at vágafólk kundu síggja, hví hon hevur verið toppskjútti í landskappingini seinastu trý árini. Vinstra hondin talaði fyri seg, og hóast Sóljan hevur ein sterkan málverja, so kundi Kristina Griksaite gera lítið annað enn at hyggja, meðan kanónkúlurnar fuku um oyruni á henni.

Hinvegin følnaði Asta Petrauskiene, sum í fyrra hálvleiki gjørdi nógv um seg, púrasta burtur í seinna. Bæði VÍF-verja og –málverji góvu henni stutt tjóður, og so var ikki so øgiliga nógv annað, sum Sóljan kundi gera.

### Einføld uppskrift

Við sigrinum rokaði VÍF sær stigaposan fyri grundspælið, og einasti spurningurin tykist vera, hvørt tær eisini megna hetta í endaspælinum. Tað má sigast at vera stórt spell, at VÍF er somikið einaráðandi, at spenningur snøgt sagt ikki eksisterar í kappingini hjá kvinnum, men hinvegin kann hetta kanska vísa hinum liðunum, hvat er neyðugt, at gullið skal fáast til høldar.

Hóast kritikarar helst vilja føra fram, at talan er um fáar vestmenningar á liðnum, so er tað ikki hetta, sum er avgerandi fyri, hvar gullið endar. Liðið telir nakrar av allar bestu føroysku leikarunum, og tá so tríggjar útlendskar profilir verða lagdar afturat, er uppskriftin greið, og tað verður ikki fyrr enn, at onnur lið fara at nýta somu uppskrift, at spenningur aftur fer at koma í kvinnukappingina.

### Dysturin í tølum

**Sóljan-VÍF 18-32 (10-12)**

Málskjúttar:

Sóljan: Asta Petrauskiene 10 (1), Hertha Simonsen 4, Jóhanna í Horni 1, Kristianna Petersen 1, Heidi Maria Akselsen 1, Fía Selma Nielsen 1

VÍF: Ioana Rápa 15(4), Fríða Marjunardóttir 4(1), Alis Høghamar 3, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 3, Jacklin Durhuus 2, Randi Kúrb erg 2, Nicoleta Radu 2, Sóley Mikkelsen 1

Brotskøst: Sóljan 1, VÍF 6

Útvísingar: Sóljan 2, VÍF 2

Dómarar úr StÍF/VÍF: Poli Hansen & Ingi Olsen

Tjaldur-StÍF 20-29 (7-15):

# Jólafrí í Runavík

**Heimaliðið megnaði ikki at gera nakað sum helst við strandingar, sum við sigrinum vunnu seg upp á triðja plássið**

HONDBÓLTUR – MENN

*Jákup Mørk*

Í Runavíkini hevur spenningurin um mansliðið í hondbólti verið heldur størri enn vanligt hetta kappingarárið.

Fleiri góð úrslit hava verið á skránni, og móti grannunum av Strondum høvdu tjaldursmenn møguleika at koma heilt nær heiðursmerkjarøðini, nú endaspælið stendur fyri framman.



*Tað eydnaðist ikki Tjaldri at koma nærri heiðursmerkjarøðini, tá teir leygardagin fyri jól høvdu vitjan av StÍF*

### Avgjørdu í fyrra

Ætlaði sigurin hjá heimalinum varð tó av ongum, og í veruleikanum var tað heldur ongan tíð nær við, at so skuldi vera.

StÍF var alt fyri eitt omaná leygardagin, og eftir eina góða byrjan, so meira ella minni læstu teir dystin seinastu løtuna av fyrra hálvleiki. Tjaldur fekk snøgt sagt einki gjørt um seg hesa løtuna, og við átta málum á muni í steðginum, var leyst og liðugt hjá gestunum.,

StÍF helt bara fast um leiðsluna í seinna umfarinum, og spennandi gjørdist tað ongantíð.

Við sigrinum vann StÍF seg upp á fjórða plássið í grundspælinum, men tá endaspælið byrjar, eru teir á triðja plássinum, tí teir verða tá ájavnir hoyvíkingum í stigum. Tjaldur er tó bert tvey stig aftan fyri, so hóast teir fingu bank hesaferð, so er als ikki vist, at runavíkingarnir skulu avskrivast.

# Vunnu uttan Súna

FC Zwolle styrkti um støðuna í hollendsku Toto-deildini, tá teir um jólini vunnu útidystin á Telstar. Súni Olsen kom ikki á vøllin í dystinum, sum at enda gjørdist heldur javnari, enn teir í Zwolle høvdu ætlað.

Gestirnir vóru nevnliga eitt skifti á odda 2-0, men eftir at Telstar minkaði um munin, gjørdist seinasta korterið heilt spennandi.

Zwolle megnaði tó at halda tætt, og sigurin sendi Súna og teir upp á næstovasta plássið í deildini, við tað at Emmen óvæntað tapti fyri Heracles. Fimm stig eru framvegis upp til Excelsoir á oddasessinum, men sum Zwolle hevur spælt í seinastuni, tykjast vónirnar um várhálvuna at vera sera stórar í felagnum.

**-jm**

# Friðarlig jól

Jólini eru vanliga strævnasta tíðin hjá fótbóltsleikarum í Onglandi, men hjá Julian Johnsson og Hull gjørdust tey kortini heilt friðarlig.

Fríggjadagin spældu teir á heimavølli málleysan javnleik móti Southend, og tó at Southend var nærri við at vinna, so var úrslitið eitt satt vónbrot hjá heimaliðnum.

Annan jóladag skuldi Hull so ferðast til York, men umstøðurnar at spæla har vóru somikið vánaligar, at hesin dysturin varð avlýstur.

Hóast talan soleiðis bert gjørdist um eitt stig, so førkaði Hull seg uppeftir á talvuni, tí einki av hinum oddaliðnum megnaði at fáa nakra serliga úrtøku burtur úr jólunum.

**-jm**

# Hondbóltsstøður

### 1. deild kvinnur

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 12 | 12 | - | 0 | - | 0 | 342 | 214 | 128 | 24 |
| 2 | Stjørnan | 12 | 9 | - | 0 | - | 3 | 314 | 254 | 60 | 18 |
| 3 | Neistin | 12 | 8 | - | 0 | - | 4 | 262 | 226 | 36 | 16 |
| 4 | VB | 12 | 6 | - | 0 | - | 6 | 282 | 295 | -13 | 12 |
| 5 | Kyndil | 12 | 3 | - | 0 | - | 9 | 271 | 310 | -39 | 6 |
| 6 | Sóljan | 11 | 2 | - | 0 | - | 9 | 215 | 309 | -94 | 4 |
| 7 | StÍF | 11 | 1 | - | 0 | - | 10 | 200 | 278 | -78 | 2 |

### 1. deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 9 | - | 2 | - | 0 | 322 | 260 | 62 | 20 |
| 2 | Neistin | 11 | 9 | - | 2 | - | 0 | 354 | 292 | 62 | 20 |
| 3 | H71 | 12 | 5 | - | 2 | - | 5 | 329 | 334 | -5 | 12 |
| 4 | StÍF | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 326 | 315 | 11 | 11 |
| 5 | Tjaldur | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 290 | 332 | -42 | 8 |
| 6 | KÍF | 12 | 3 | - | 1 | - | 8 | 314 | 354 | -40 | 7 |
| 7 | Kyndil | 12 | 2 | - | 0 | - | 10 | 274 | 322 | -48 | 4 |

# Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 109 | (31) |
| Asta Petrauskine | Sóljan | 100 | (12) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 91 | (38) |
| Gabriella Fekete | VB | 87 | (21) |
| Ioana Rápa | VÍF | 83 | (20) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 62 | (1) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 59 | (8) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 59 | (29) |
| Regina Radó | VB | 58 | (13) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 52 | (1) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 52 | (8) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 49 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 49 | (3) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 49 | (9) |
| Birita Wardum | Neistin | 47 | (4) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Costin Dumitrescu | StÍF | 80 | (24) |
| Bjarni Wardum | H71 | 74 | (15) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 71 | (8) |
| Sámal Joensen | VÍF | 71 | (12) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 70 | (10) |
| Finnur Hansson | H71 | 70 | (19) |
| Heini Joensen | Neistin | 70 | (21) |
| Høgni Klein | Kyndil | 69 | (3) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 64 | |
| Dorica Tomic | KÍF | 63 | (16) |
| Ingi Olsen | VÍF | 59 | (7) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 56 | (6) |
| Iljan Topic | KÍF | 54 | |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 50 | (5) |
| Artur Johansen | StÍF | 46 | (1) |

# Støður uttanlands

### Hollendska toto-deildin

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Excelsoir + | 19 | 13 | - | 4 | - | 2 | 39 | 13 | 26 | 43 |
| 2 | FC Zwolle | 19 | 11 | - | 5 | - | 3 | 33 | 22 | 11 | 38 |
| 3 | Emmen | 19 | 11 | - | 4 | - | 4 | 32 | 19 | 13 | 37 |
| 4 | Cambuur/L. + | 19 | 10 | - | 4 | - | 5 | 29 | 18 | 11 | 34 |
| 5 | ADO Den Haag | 19 | 9 | - | 6 | - | 4 | 27 | 17 | 10 | 33 |
| 6 | RBC Roo'daal | 19 | 9 | - | 5 | - | 5 | 39 | 23 | 16 | 32 |
| 7 | BV Veendam | 18 | 9 | - | 5 | - | 4 | 34 | 26 | 8 | 32 |
| 8 | Dordrecht '90 | 19 | 8 | - | 5 | - | 6 | 37 | 27 | 10 | 29 |
| 9 | Haarlem | 19 | 8 | - | 5 | - | 6 | 25 | 24 | 1 | 29 |
| 10 | FC Volendam | 18 | 7 | - | 3 | - | 8 | 30 | 25 | 5 | 24 |
| 11 | VVV | 19 | 7 | - | 1 | - | 11 | 35 | 38 | -3 | 22 |
| 12 | Storm/Telstar | 19 | 5 | - | 6 | - | 8 | 25 | 24 | 1 | 21 |
| 13 | Heracles A. | 19 | 6 | - | 3 | - | 10 | 24 | 29 | -5 | 21 |
| 14 | G.A. Eagles | 19 | 5 | - | 6 | - | 8 | 28 | 38 | -10 | 21 |
| 15 | MVV | 19 | 5 | - | 4 | - | 10 | 27 | 31 | -4 | 19 |
| 16 | Helmond Sp. | 19 | 4 | - | 7 | - | 8 | 18 | 29 | -11 | 19 |
| 17 | Eindhoven | 19 | 2 | - | 3 | - | 14 | 20 | 51 | -31 | 9 |
| 18 | Top/Oss | 19 | 2 | - | 2 | - | 15 | 13 | 61 | -48 | 8 |

Perioduvinnarnari eru merktir »+«

Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

### Enska 3. deild

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Plymouth | 24 | 14 | - | 7 | - | 3 | 35 | 15 | 20 | 49 |
| 2 | Luton | 24 | 14 | - | 4 | - | 6 | 47 | 31 | 16 | 46 |
| 3 | Hull C. | 23 | 11 | - | 8 | - | 4 | 37 | 22 | 15 | 41 |
| 4 | Mansfield | 23 | 12 | - | 5 | - | 6 | 37 | 26 | 11 | 41 |
| 5 | Rochdale | 23 | 11 | - | 6 | - | 6 | 33 | 26 | 7 | 39 |
| 6 | Scunthorpe | 23 | 10 | - | 8 | - | 5 | 40 | 25 | 15 | 38 |
| 7 | Shrewsbury | 24 | 11 | - | 5 | - | 8 | 34 | 27 | 7 | 38 |
| 8 | Cheltenham | 23 | 9 | - | 8 | - | 6 | 34 | 31 | 3 | 35 |
| 9 | R&D | 24 | 8 | - | 9 | - | 7 | 28 | 26 | 2 | 33 |
| 10 | Exeter | 24 | 9 | - | 6 | - | 9 | 26 | 38 | -12 | 33 |
| 11 | Kidderm. | 22 | 9 | - | 5 | - | 8 | 24 | 21 | 3 | 32 |
| 12 | Southend | 24 | 9 | - | 4 | - | 11 | 28 | 28 | 0 | 31 |
| 13 | Leyton O. | 24 | 8 | - | 6 | - | 10 | 37 | 38 | -1 | 30 |
| 14 | Swansea | 24 | 8 | - | 6 | - | 10 | 31 | 35 | -4 | 30 |
| 15 | Hartlepool | 23 | 8 | - | 5 | - | 10 | 28 | 22 | 6 | 29 |
| 16 | Darlington | 22 | 8 | - | 5 | - | 9 | 27 | 31 | -4 | 29 |
| 17 | Macclesfield | 24 | 6 | - | 9 | - | 9 | 23 | 31 | -8 | 27 |
| 18 | Oxford Utd. | 24 | 6 | - | 8 | - | 10 | 27 | 32 | -5 | 26 |
| 19 | Lincoln C. | 23 | 5 | - | 10 | - | 8 | 22 | 28 | -6 | 25 |
| 20 | Bristol R. | 23 | 6 | - | 6 | - | 11 | 21 | 30 | -9 | 24 |
| 21 | Torquay | 24 | 6 | - | 6 | - | 12 | 21 | 36 | -15 | 24 |
| 22 | York | 22 | 6 | - | 4 | - | 12 | 26 | 40 | -14 | 22 |
| 23 | Carlisle | 23 | 4 | - | 8 | - | 11 | 19 | 30 | -11 | 20 |
| 24 | Halifax | 23 | 4 | - | 8 | - | 11 | 17 | 33 | -16 | 20 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)